# MbF mótmælir

**Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum hevur sent Sámal Petur í Grund, landsstýrismanni í almanna- og heilsumálum skriv, har tey mótmæla, at psykiatriska deild letur aftur um jólini**

MÓTMÆLI
*Ingrid Bjarnastein*



Hvørt ár á jólum letur onkur deild á Landssjúkrahúsinum aftur. Hetta kemst av vantandi arbeiðsorku og er hetta eisini ein liður í starvsfólkapolitikkinum.

– Vit halda ikki, at tað er rætt, at deildir lata aftur, sigur Doris Hansen, formaður í MBF.

– Myndugleikararnir vilja ikki játta meira pening til at seta fleiri fólk, men í síðsta enda kostar tað nógv meira at lata eina deild aftur enn at seta nýtt fólk í starv.

Tá deildin letur aftur, verða sjúklingarnir, ið har liggja sendir út í eystur og vestur. Nakrir verða lagdir inn á eina aðra deild, og teimum sum ikki er pláss fyri, verða sendir heimaftur til familju og avvarðandi. Tað sigur seg næstan sjálvt, at sjúklingarnir, sum eru mitt í eini viðgerð fara aftur, tá viðgerðin verður avbrotin á henda hátt.

– Tá teir verða sendir á eina aðra deild, so eru persónarnir, sum dagliga fáast við sjúklingarnar ikki longur um teir, og hetta ger at fólkið, sum teir hava álit á er burtur, greiðir Doris Hansen frá.

– Nógv av teimum, sum verða send heim, klára ikki at vera heima á jólum. Óteljandi dømi eru um, at tey fáa tað verri tá tey fara heim, og er hetta eitt stórt afturstig í viðgerðini. Um tey kenna seg einsamøll, so kenna tey so ofta uppaftur meira einsamøll tá tey verða send heim. Ella um tey eru deprimeraði, so verða tey ofta meira deprimeraði, tí tey sum familjulimir ikki rættiliga megna at liva upp til tær væntanir, ið verða settar teimum, sum til dømis at skapa hugna og annað.

### Ov nógv avspáking

Alt ov fá fólk arbeiða á psykiatrisku deild, og hetta ger, at starvsfólkið, sum longu er har, arbeiðir nógva yvirtíð. Tískil verður teimum nógv avspáking til góðar og skal hetta alt avgreiðast innan árið er liðugt. Tí noyðist deildin at lata aftur.

Um myndugleikarnir høvdu játtað meira pening til starvsfólkasetan, so høvdu fleiri pengar verið spardir í síðsta enda. Tá deildirnar verða stongdar, so veit man, at sjúklingarnir fáa tørv á fleiri tímum, og er tað ein líknandi trupulleiki, sum hevur stungið seg upp á deild 6 í løtuni. Starvsfólkatalið verður minkað, og arbeiðið til tey, ið eru eftir veksur. Ov fá fólk og ov stór arbeiðsbyrða botnar í, at starvsfólkini verða overvað.

Teir hægru myndugleikarnir, tað vil siga læknar og sjúkrasystrar á deildunum, taka undir við mótmælinum hjá MBF.

### Gera metingar

Í skrivinum til Sámal Petur í Grund heitir MBF um at gera nakrar metingar av, hvussu nógv tað í veruleikanum kostar at lata deildirnar aftur. Eisini vilja tey vita, hvussu nógv tað kostar í afturstigum hjá sjúklingum, sum eru innløgd fyri at fáa viðgerð. Tann peningur, ið verður spardur við at lata deildina aftur, verður nýttur fleiri ferðir umaftur við yvirtíðargjaldi árið eftir fyri at rætta »skaðan« uppaftur.

MPF umboðar í hesum sambandi 22 av limafeløgum sínum. Tey vilja als ikki góðtaka, at deildir lata aftur, og halda, at hetta er ógvuliga illa umhugsað av myndugleikunum.

Skrivið varð sent landsstýrismanninum í síðstu viku, men enn hevur MBF ikki fingið nakra svar uppá mótmælið.

# Spentu viðurskiftini skulu broytast

**Avloysarin hjá Poul Nyrup Rasmussen fer at gera alt, hann er mentur at broyta spentu støðuna millum Føroyar og Danmark. Tað boðaði hann frá í setanarrøðuni hjá sær í gjár. Báðir teir føroysku fólkatingslimirnir eru nøgdir við fyrstu útmeldingina frá Fogh**

SETANARRØÐA
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Anders Fogh Rasmussen vil ikki síggja eina endurtøku av hørðu samanbrestunum, sum fleiri ferðir vóru millum stjórnina hjá Poul Nyrup Rasmussen og landsstýrið.

– Eg fari at gera mítt ítrasta at royna at bloyta viðurskiftini og fáa í lag eitt gott og álitisfult samskifti um framtíð Føroya, segði Anders Fogh Rasmussen av fólkatingsins røðarapalli í sínari fyrstu setanarrøðu í gjár.

Anders Fogh Rasmussen vil av øllum alvi vísa veljarunum, at tað nú situr ein nýggjur maður í politiska oddasessinum í Danmark. Politikkurin hjá undanfarnu stjórnini varð vrakaður á valinum 20. november, og nýggja stjórnin fer at leggja eina nýggja kós í flestøllum viðurskiftum. Hesa endurnýggjan vil stjórnin eisini vísa í verki, tá ið tað snýr seg um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark og teir tríggjar partarnar í Ríkisfelagsskapinum sum heild.



Støðan, sum undanfarna stjórnin hevði um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, er tí ikki neyðturviliga tann sama støðan, sum nýggja stjórnin hevur.

### Sinnað at gera broytingar

Anders Fogh Rasmussen fór ikki í smálutir í setanarrøðuni hjá sær, og tí ber ikki til at siga enn, júst hvussu vit fara at síggja og merkja ein møguligan nýggjan Føroya-politikk. Nýggja stjórnin er eins og gamla stjórnin áhugað í at varðveita Ríkisfelagsskapin, og sigur, at hann skal vera ein felagsskapur millum trý fólk á jøvnum føti, Føroyar Grønland og Danmark.

– Og stjórnin er sinnað til at endurnýggja heimastýrini í einum uppbyggjandi og virðiligum samstarvi við Føroyar og Grønland, legði Anders Fogh Rasmussen afturat.

Hann boðaði frá, at stjórnin hevur ta støðu, at føroyingar avgera sína egnu framtíð sjálvir.

– Tað veri seg, um føroyingar vilja hava fullveldi, ella um teir vilja menna samstarvið innanfyri Ríkisfelagsskapin.

### Nøgd við røðuna

Báðir teir nývaldu føroysku fólkatingslimirnir, Lisbeth L. Petersen og Høgni Hoydal, vóru hjástaddir í fólkatingssalinum, tá ið Anders Fogh Rasmussen helt setanarrøðuna. Og tey siga seg bæði tvey vera nøgd við boðskapin hjá forsætisráðharranum.

– Hetta eru heilt greitt nýggir tónar, og tað er at fegnast um, sigur Høgni Hoydal, meðan Lisbeth Petersen vísir á, at Anders Fogh Rasmussen tosar um at broyta og menna samstarvið innanfyri Ríkisfelagsskapin, og tað samsvarar við ynskini hjá Sambandsflokkinum.

### Samráðingarnar halda fram

Í fyrsta umfari er stjórnin sinnað at halda fram við samráðingunum við landsstýrið um at yvirtaka málsøki í heimastýrislógini og fíggjarligu ábyrgdina av teimum yvirtiknu málsøkjunum. Einki varð sagt um eina møguliga skiftistíð, um føroyingar taka avgerð um at fara út úr Ríkisfelagsskapinum og skipa Føroyar sum fullveldi.

Ein munur millum røðuna hjá Anders Fogh Rasmussen og fleiri av røðunum, sum Poul Nyrup Rasmussen helt, er, at nýggi forsætisráðharrin ikki nevndi nakað ítøkiligt alternativ til at Føroyar fara út úr Ríkisfelagsskapinum. Poul Nyrup Rasmussen vísti í sínum røðum á eina skipan við sjálvstýri innanfyri Ríkisfelagsskapin og hugsaði her helst um sjálvstýrislógina hjá Javnaðarflokkinum.

Anders Fogh Rasmussen valdi í staðin at lata allar dyr standa opnar og vísti bert á, at stjórnin er sinnað at samráðast um tað, sum føroyingar vilja samráðast um – í fyrsta umfari um yvirtøkur eftir heimastýrislógini.

Í morgin fáa føroysku fólkatingslimirnir høvi til at gera viðmerkingar til ætlaða politikkin hjá stjórnini. Høgni Hoydal fer at nýta hetta høvi og vísa á sína støðu um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, men tað er ógreitt, um Lisbeth L. Petersen fer at taka orðið frá fólkatingsins røðarapalli í hesum umfarinum.

## Kappingin um miðnámsskúla í Suðuroy

**Tíðindaskriv**

Fyrst í september í ár bjóðaði Mentamálastýrið til projektkapping um uppskot til nýggjan miðnámsskúla í Suðuroy. Innlatingarfreistin nærkast, og Arkitektafelag Føroya upplýsir, at 25 teknistovur og einstaklingar hava biðið um kappingartilfar.

Dømingin fer fram í Vági og byrjar tann 7. desember. Dómsnevndin ætlar at hava dømingina lidna mánadagin tann 10. desember og at kunngera úrslitið av kappingini sama dag.

Uppskotini verða síðani sýnd fram í Stóra Pakkhúsi í Vági í døgunum 11.–16. desember, hvønn dag frá klokkan 15 til 18.



# Arbeiða fyri IOC viðurkenning



*Heðin Mortensen sigur, at nevndin hevur sett sær sum mál, at í 2003 skal føroyska umsóknin til viðgerðar hægsta stigi. So er bara at vóna játtandi svar*

**Umboð frá Ítróttarsambandi Føroya hava júst verið í Danmark, har teir hava fingið stuðul frá hinum ítróttarsambondunum í Norðurlondum fyri føroyskari viðurkenning í altjóða olympisku nevndini (IOC). Málið er at fáa viðurkenning í 2003, so at føroysk ítróttarfólk kunnu vera við í olympisku leikunum**

ÍTRÓTTUR
*Stefan í Skorini*

Heðin Mortensen, forseti í ÍSF, Sverri Midjord, næstformaður, og Petur Elias Petersen, skrivari hava júst verið í Danmark, og endamálið við hesi ferðini hjá nevndini í ÍSF er at fáa stuðul frá hinum Norðurlondunum fyri føroyskari IOC viðurkenning.

– Málið hjá okkum er at fáa viðurkenning frá IOC í 2003. Um hetta málið skal náast er neyðugt, at vit gera eitt umfatandi lobby-virksemi, so at vit fáa stuðul frá so nógvum londum sum gjørligt, sigur Heðin Mortensen úr Keypmannahavn.

Nevndin hjá ÍSF hevði eisini onnur ørindi í Danmark, og tað var at fyrireika ein fund í norðurlendsku felagsnevndini, sum verður í Føroyum í september næsta ár. Fundarskráin er løgd til rættis, og eitt punkt á skránni er føroyskur limaskapur í IOC, International Olympic Committee.

### Breiðan stuðul

– Vit hava fingið stuðul frá øllum hinum ítróttarsambondunum í Norðurlondum. Eisini eru lond sum Holland, Týskland og tey baltisku londini sinnað at stuðla okkara roynd at sleppa við, sigur Heðin Mortensen, sum tó leggur afturat, at londini í Suðurevropa ikki eru eins vinarliga sinnað mótvegis Føroyum sum okkara nærmastu grannar.

Tað er ein sannroynd, at tað er torførari hjá smátjóðum at sleppa við í IOC enn hjá størri tjóðum. Tí má ítróttarsambandið gera eitt stórt arbeiði fyri at fáa onnur lond at viðurkenna okkara rætt at luttaka í olympisku leikunum.

Heðin Mortensen sigur, at í næstum fer ítróttarsambandið at seta seg í samband við øll limalondini í altjóða olympisku nevndini. Hetta verður gjørt við at senda teimum ein faldara, har greitt verður frá Føroyum, og at vit lúka allar ítróttarligar treytir fyri at vera við.

Ítróttarsambandið er sostatt farið undir eina herferð, sum hevur til endamáls at geva føroyskum ítróttarfólki rættin at luttaka í olympisku leikunum.

### Danska hjálp

Danska ítróttarsambandið stuðlar Føroyum í royndini at sleppa inn í hitan hjá spaniólanum Juan Antonio Samaranch, ið er forseti í IOC.



*Ítróttarsamband Føroya hevur sett alt inn fyri at fáa Føroyum viðurkenning í IOC, so at føroysk ítróttarfólk fáa møguleikan at royna seg á teimum olympisku leikunum. Her eru tveir glímarar í hornatøkum á leikunum í Sydney á sumri í fjør*

Ein konsulentur frá danska ítróttarsambandinum er settur at hjálpa føroyska ítróttarsambandinum, og Kári á Rógvi skal veita løgfrøðiliga ráðgeving.

– Tá okkara umsókn einaferð verður tikin til viðgerðar á hægsta stigi í nevndini, skal eingin ivi vera um, at vit lúka treytirnar og tí er neyðugt at vera væl fyrireikaður, sigur Heðin Mortensen.

Um eitt ár fer IOC at hava aðalfund í Íslandi. Føroyar eru bodnar við sum eygleiðarar, og tá verður aftur eitt høvi at gera vart við seg. Tá er ætlanin, at tey norðurlendsku sambondini skulu innstilla Føroyar til viðurkenning.

Í upptøkunevndini sita 126 limir, og har krevst stuðul frá meira enn helvtini av limunum.

### Fíggjarligur stuðul

Um Føroyar fáa viðurkenning og soleiðis sleppa at vera við í leikunum fer hetta at hava við sær stórar fíggjarligar fyrimunir.

– Yvirskotið frá olympisku leikunum verður býtt útafur til limalondini, og har fáa vit okkara part av køkuni. Hesin peningur verður nýttur til at fremja ítróttarligt virksemi í Føroyum, so viðurkenning frá IOC hevði gagnað føroyskum ítróttarlívi, sigur Heðin Mortensen.

Føroyar hava fyrr søkt um viðurkenning frá IOC, men henda umsókn er ikki gingin á møti enn. Tó hava Føroyar ikki fingið noktandi svar frá altjóða nevndini.

Hetta gevur Heðini góða vón um, at tað skal eydnast teimum at vinna Føroyum rætt til at luttaka í olympisku leikunum. Kanska síggja vit føroyska Merkið á leikunum í Athen í 2004, um alt gongur eftir ætlan hjá Heðini, Sverra og Petur Eliasi.

# 124 nýggir persónbilar í november

HAGTØL
*Stefan í Skorini*



Bileftirlit Føroya hevur kunngjørt hagtøl fyri nýggj akfør fyri november. Tey vísa, at bileftirlitið hevur skrásett 124 nýggjar persónbilar í hesum tíðarskeiðnum. Í november í fjør vórðu 112 bilar skrásettir.

Higartil í ár eru skrásettir 1432 nýggir persónbilar. Sama tíðarskeið í fjør vórðu bara 1219 nýggir persónbilar skrásettir. Hesi tøl vísa, at framburðurin í samfelagnum enn merkist hjá bilasølum, ið selja meira enn nakrantíð. Nógv fleiri viðfestivognar og vøruvognar eru skrásettir í ár enn fjør.

Higartil í ár eru skrásetti tilsamans 1882 nýggj akfør, tá alt slag verður talt við. Sama tíðarskeið í fjør vórðu 1619 nýggj akfør skrásett. Alt árið í fjør vórðu 1738 akfør skrásett hjá Bileftirliti Føroya.

## Herverk í Skopun

RÆTTING
*Stefan í Skorini*

Í blaðnum í gjár stóð skrivað, at herverk hevði verið í Ungmannafelagshúsinum á Sandi. Lesarar hava gjørt vart við, at hetta ikki er rætt, men at herverkið varð framt í Ungmannafelagshúsinum í Skopun. Bygdirnar eru komnar í bland hjá blaðmanninum.